136 *Guds ríki hevur vald!*

(Opinberingin 11:15; 12:10)

1. Jehova, tú ævinnar Gud,
vit prísa tíni gerð.
Í hásætið setti tú Krist
at skipa rættin her.
Títt ríki er í himli føtt,
skjótt er á jørð øll illgerð bøtt.

(*NIÐURLAG*)
Títt ríki hevur vald,
og frelsu tað menniskjum ber.
Títt ríki hevur vald!
Á Gud, komi ríki títt her!

2. Skjótt farin er Djevulsins tíð,
øll verðin er í neyð.
Vit vita, at frelsan er nær,
alt verður, sum tú beyð.
Títt ríki er í himli føtt,
skjótt er á jørð øll illgerð bøtt.
(*Niðurlag*)

3. Í himli er fagnaðarróp,
har hoyrist einglakór.
Nú Satan er kastaður út,
er gleðin ovurstór.
Títt ríki er í himli føtt,
skjótt er á jørð øll illgerð bøtt.
(*Niðurlag*)

(Sí eisini Dán. 2:34, 35; 2 Kor. 4:18.)

© 2015 Watch Tower Bible and Tract Society of Pennsylvania